# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Tríggjar gentur vunnu oljukapping

**Kapping hevur verið millum næmingar í miðnámsskúlunum í Føroyum. Tað ráddi um at finna mest møguliga olju og vinna pening í einum teldu-spæli, nevnt Oil-Sim**

*Elin Maria Olsen & Anita Samuelsen, praktikantar*

Seinnapartin í gjár vóru vinnararnir í Oil-Sim kappingini kunngjørdir. Reidar Nónfjall, stjóri á Føroya Handilsskúla, greiddi frá hvat kappingin var um, og hvussu hon hevði gingist.

Bólkar við næmingum á Føroya Handilsskúla hava klárað at fingið 1., 2. og 4. plássið, og ein bólkur úr Føroya Studentaskúla fekk 3. pláss.

Kappingin var hørð, men alla tíðina lá Bólkur 1 úr F1 flokkinum á Føroya Handilsskúla fremst. Men tá hálvur tími restaði byrjaði Bólkur 2 at hála inn á Bólk 1, og tá bara fýra minuttir áðrenn kappingin endaði, tók Bólkur 2 seg fram um Bólk 1 og legði seg á odda.

Sostatt gjørdist vinnaralið-ið Bólkur 2 í F1 á Handilsskúlanum í Tórshavn. Bólkurin var bara mannaður av gentum, og tær vóru: Elisabeth Á.Clementsen, Durita Johansen og Guðrið Jacobsen.

Genturnar vunnu við at gera íløgur í virkið hjá Bólki 1, og tá bert fýra minuttir vóru eftir, fingu tær ein av hinum bólkunum at stuðla teimum, við at geva sær 50 mió.$, so tær kundu byrja at bora eftir olju, og tað var avgerandi í síðsta enda.

Genturnar vunnu 5000 kr. og eina ferð til London, har tær skulu kappast víðari við fleiri øðrum londum. Tað verður so ikki fyrrenn í januar mánaði 2007.

Í samband við at flokkurin á Føroya Handilsskúla klár-aði seg so væl, hevur skúlin skipað fyri námsferð til Gjáar, har allar útreiðslur verða rindaðar av Føroya Handilsskúla.




*Dreingirnir lógu fremstir alla kappingina, men tá bara fýra minuttir restaðu til kappingin var liðug, yvirhálaðu genturnar og endaðu omaná. Aftast frá vinstru: Elisabeth Á. Clementsen, Durita Johansen og Guðrið Jacobsen. Fremst frá vinstru: Jákup Berg, Hjørtur K. Justinussen, Hallur Djurhuus og Bjartur Hjaltalin*

*Mynd: Alvin Ellebye Andersen*

**Samferðsluplanleggjari**

**Samferðsludeildin á Strandferðsluni sóknast eftir dugnaligum samferðsluplanleggjara**

**Sum samferðsluplanleggjari fært ábyrgd av rutuplanlegging og fyriskipan av ferðaætlanini fyri Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.**

sansir.fo

Starvið er breitt og spennandi, har tú kemur at arbeiða við greiningum av ferðslu, marknaði og prísskipanum. Eisini kemur tú at arbeiða við útbjóðing av Bygdaleiðum, fíggjarætlan og sáttmálastýring.

Dentur verður lagdur á verkætlanararbeiði, og verður tú við til at menna nýggjar tænastur, at innføra KT-amboð og aðrar mennandi verkætlanir.

Tú kemur eisini at taka tær av dagligum uppgávum á deildini so sum samskipan, eftirlit og fyriskipan av flutningsavtalum.

**Førleikakrøv**
Vit rokna við, at tú:
- hevur útbúgving innan logistikk, verkfrøði ella búskap
- hevur royndir í fakinum og við prosjektarbeiði
- hevur evnini at arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- ert ágrýtin, hevur góð samstarvsevni og eitt lætt lyndi
- orðar teg greitt og væl, bæði munnliga og skrivliga

**Umsókn og treytir**
Starvið verður sett sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknarfreistin er 13. november, klokkan 12. Send umsóknina við próvskjølum og møguligum viðmælum til: Strandfaraskip Landsins, stílað: Starvsfólkadeildin, Boks 88, FO-110 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Andrass Jensen, deildarleiðara, á telefon 34 30 00 ella t-post anj@ssl.fo

Uppgávan hjá Samferðsludeildini er at skipa almenna samferðsluøkið. Vit leggja til rættis, stýra, selja, samskipa og kunna um almennu ferðsluna á sjógvi og landi. Strandfaraskip Landsins reka 29 leiðir (22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir). Til hendan rakstur eru uml. 40 bussar og 8 ferjur. Samlaða talið á starvsfólkum á SL svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS

**Skrivstovufólk**

**Samferðsludeildin á Strandferðsluni sóknast eftir dugnaligum skrivstovufólki til hálvtíðarstarv.**

sansir.fo

Sum skrivstovufólk hevur tú umsitingarligu uppgávurnar á deildini um hendi. Uppgávurnar eru m.a. at umsita:
- sáttmálaavrokningar á Bygdaleiðum
- faktureringar av ymsum flutningstænastur
- skúlakort og onnur elektronisk kort og Buscom-modulir
- journalisering og búnar
- skrivarauppgávur og aðrar fyrifallandi uppgávur

Starvið verður skipað sum hálvtíðarstarv, tó við møguleika fyri at broyta til fulla tíð seinni.

**Førleikakrøv**
Vit rokna við:
- at tú hevur hóskandi útbúgving (HH, skrivstovuútbúgving ella líknandi) og royndir
- at tú hevur edv-kunnleika á brúkarastigi
- at tú ert ágrýtin og fleksibul og hevur góðan røkjuskap
- at tú hevur góð samstarvsevni og góðan tænastuhugburð
- at tú orðar teg væl, bæði munnliga og skrivliga

**Umsókn og treytir**
Starvið verður sett sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 02.

Umsóknarfreistin er 13. november klokkan 12. Send umsóknina við próvskjølum og møguligum viðmælum til: Strandfaraskip Landsins, stílað: Starvsfólkadeildin, Boks 88, FO-110 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú venda tær til Andrass Jensen, deildarleiðara, á telefon 34 30 00 ella t-post anj@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS